

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 09 - 2012

# Oljuskip til Føroya at kroka og bunkra

Nú oljumenningin vestan fyri Hetland flytur seg longur og longur vestureftir móti føroykum øki, hava mongu veitingarskipini, ið arbeiða á hesum leiðum, eisini eyguni eftir Føroyum. Illverður á leiðunum ger, at skipini seta kós móti Føroyum fyri at kroka, bunkra og skifta manning. So var hjá risastóra veitingarskipinum Subsea Viking, sum kom á Havnina undan illveðrinum gjáranáttina. Skipið hevur áður verið í Føroyum í somu ørindum. Tá eins og nú helt skiparin, at tað mundi vera skilabest at leggja leiðina til Havnar. Subsea Viking er eitt av teimum heilt stóru veitingarskipunum, sum hevur útgerð eitt nú tríggjar fjarstýrdar kavbátar til at arbeiða við tungum útbúnaði á havbotninum. Soleiðis sum gongdin er vestan fyri Hetlandi í løtuni og mongu komandi árini, kunnu vit rokna við, at fleiri av hesum stóru skipum fara at gera meira brúk av føroyskum vørum og tænastum, tí oljufeløgini koma nærri og næri føroyska markinum við sínum íløgumilliardum. Tað er Faroe Agency, sum er umboð hjá hesum skipinum. Carl Erik Reynheim, stjóri sigur, at tað er hugaligt at síggja, sohvørt útbyggingar og framleiðsla koma nærri og nærri Føroyum, at tað tá verður lønandi at fara í føroyska havn heldur enn til Hetlands og Skotlands. Mynd Subsea Viking bunkrar í Havn